**Jørgen Niclasen**
**Jacob Vestergaard**
**Jákup Mikkelsen**
**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
**Jógvan á Lakjuni**
**Joen Magnus Rasmussen**
**løgtingsmenn vegna Fólkaflokkin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 1/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi** (Fleiri fiskidagar til bólk 5)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi
(Fleiri fiskidagar til bólk 5)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, sum broytt við løgtingslóg nr. nr. 33 frá 20. apríl 2018, løgtingslóg nr. 162 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 178 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 186 frá 21. desember 2018 og løgtingslóg nr. 66 frá 9. mai 2019, verður § 74, stk. 1, nr. 6 orðað soleiðis:

"6) Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiðu: 12.000 fiskidagar."

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Almennar viðmerkingar**
Uppskotið verður lagt fram, tí smáu útróðrarbátarnir undir 15 tons, bólkur 5 B, eru lagdir orsakað av, at ongir fiskidagar eru eftir.

Tað er spell, at tað kom hartil, tí tey, sum hava fylgt eitt lítið sindur við, hava vitað, at dagatalið í bólki 5 B fór at verða brúkt, tá árið var hálvrunnið. Um dagatalið varð stillað rætt, ella skipanin við útróðrarbátum í bólki 5 varð broytt, var verandi støða ikki íkomin.

Mett verður, at neyðugt er at fremja hesa broyting í lógini, tí broytingin, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Høgni Hoydal, ætlar at fremja í Kunngerð nr. 76 frá 22. mai 2019, Kunngerð um treytir fyri fiskiloyvi 5 A og 5 B og reglur um býtið av fiskidagatalinum hjá bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons, ger, at eisini teir fult riknu bátarnir í bólki 5, bólkur 5 A, fara at mangla fiskidagar, áðrenn árið er liðugt.

Bólkur 5 B hevði fiskað gott 1.300 tons av toski, tá bátarnir blivu lagdir. Tey 1.300 tonsini hava stóran týdning fyri tey, sum hava útróður sum hjávinnu, og tey, sum ætla sær at hava útróður sum yrki, men tey hava ongan týdning í tí stóra samanhanginum.

Tað eru fleiri, sum seinastu tíðina hava keypt sær bát, við tí fyri eyga at liva av útróðri. Hesi eru komin sera illa fyri, tí dýru bátarnir skulu rindast aftur. Hettar letur seg ikki gera so leingi, sum bátarnir liggja við bryggju.

**Avleiðingarnar av uppskotinum**
Við at hækka dagatalið í bólki 5 og at marka dagarnar til bólk 5 B, fara bæði bólkur 5 A og bólkur 5 B at hava nóg mikið av døgum, tað sum eftir er av árinum. Ein nýggj samgonga fær góða tíð til at viðgera, hvussu bólkur 5 skal skipast. Uppskot um tað kann leggjast fyri tingið, áðrenn nýtt fiskiár byrjar.

Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar.

**Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Fiskidagatalið í bólki 5 verður økt frá 8.879 døgum til 12.000 dagar.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

**Á Løgtingi, 29. juli 2019**

| | |
|---|---|
| Jørgen Niclasen | Jacob Vestergaard |
| Jákup Mikkelsen | Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur |
| Jógvan á Lakjuni | Joen Magnus Rasmussen |